Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

uppá

skrivligan fyrispurning eftir § 52 a í Tingskipanini frá Hervør Pálsdóttir, løgtingskvinnu um veðurlagspolitikk Føroya.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu gongur við arbeiðinum at gera ein nýggjan veðurlagspolitikk fyri Føroyar ?
2. Nær ætlar landsstýrismaðurin at bjóða øllum flokkum við í arbeiðið fyri at fáa breiða semju um veðurlagspolitikkin ?
3. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at tryggja sær, at veðurlagspolitikkurin verður fylgdur, soleiðis at vit røkka málinum at minka um okkara útlát?

Svar:
Til 1
Føroyar standa í tí støðu, at okkum vantar ein dagførdan veðurlagspolitikk og greið mál at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi, sum kunnu avloysa veðurlagspolitkkin, sum í 2009 varð einmælt samtyktur í Løgtinginum stutt fyri stóra COP 15 veðurlagsfundin í Keypmannahavn. Tá eydnaðist tað tásitandi samgongu og andstøðu at semjast um ein veðurlagspolitikk, har málið var at minka útlátið av vakstrarhúsgassi við í minsta lagi 20 prosentum fram til 2020 í mun til útlátstølini í 2005. Eisini fekst ein semja í lag við donsku stjórnina um, at útlátstølini fyri Føroyar skuldu fráboðast Sameindu Tjóða serskilt og ikki sum ein partur av tølunum hjá Danmark. Fyri Føroyar hevur tað merkt, at vit hava greið tøl, sum vísa, hvussu útlátið av vakstrarhúsgassi minkar ella veksur ár eftir ár.

Søgan hesi 11 árini hevur víst okkum, at hóast allir flokkar á tingi gjørdu eina breiða semju um veðurlagspolitikkin, so eydnaðist tað okkum ikki at røkka málunum um at minka útlátið stórvegis í tíðarskeiðinum 2010-2020. Høvuðsorsøkin er, at vit politiskt ikki hava megnað at fremja tey átøk, sum veruliga muna. Vit hava kanska vónað, at skjótt syftu seiðirnir fóru at muna meira og hava ikki megnað at fara undir tað tunga takið enn. Sum dømi kunnu nevnast *byggilógin* og *bygnings-kunngerðin*, sum seta krøv til bygging og bjálving av nýggjum húsum og bygningum, og *elveitingarlógin*, sum lat upp fyri skjótari útbygging av vindorku og avgjaldslættar til góðkendar hitapumpur og el- og vetnisbilar eftir *mvg-lógini* og *lóg um skrásetingargjald* av akførum.

Tað er tí framhaldandi okkara felags ábyrgd og uppgáva at vísa á gongdar leiðir at minka útlátið av vakstrarhúsgassi. Seinasta heyst setti eg tí ein arbeiðsbólk at fyrireika eitt uppskot til orku- og veðurlagspolitikk. Bólkurin hevur í sínum arbeiði tikið støði bæði í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu og í frágreiðingum, sum undanfarna samgonga lat gera. Á henda hátt vóni eg at byggja brýr millum flokkar, andstøðu og samgongu og valskeið.

Til 2
Fyri fáum døgum síðani fekk eg fyrsta útkastið um veðurlagspolitikk frá arbeiðsbólkinum. Talan er um spennandi útspæl, ið hevur fleiri enn 20 ymisk uppskot um átøk, sum kunnu skerja føroyska útlátið av veðurlagsgassum. Útspælið frá arbeiðsbólkinum verður grundarlag undir politiska arbeiðinum við at evna til endaliga veðurlagspolitikk Føroya fyri komandi árini.

Eg fari um fáar dagar at bjóða umboðum fyri politisku flokkarnar á fund fyri at leggja fram eitt uppskot um veðurlagspolitikk. Vónin er at fáa semju um veðurlagspolitikkin, t.e. bæði veðurpolitisku málini og átøkini, sum skulu tryggja, at málini verða nádd. Somuleiðis er ætlanin, at bæði mál og átøk verða samtykt í Løgtinginum sum uppskot til samtyktar, áðrenn Løgtingið fer til hús seinni í vár.

Komandi vikurnar er ætlanin at inndraga viðkomandi vinnugeirar, áhugafeløg v.m. í arbeiðið við at evna til veðurlagspolitikkin. Eisini verður umhugsað at skipa fyri almennum tiltaki at kunna um ætlanirnar á veðurlagsøkinum.

Umráðandi er, at vit fáa so stóra semju um orku- og veðurlagspolitikkin sum til ber, tí talan er málsøki, har stór tøk skulu takast í áratíggju. Politisk semja er tískil neyðug fyri at tryggja eina støðufasta kós í langa tíð frameftir.

Til 3
At handhevja ein politikk er trupult, tí at styrkin í einum politikki sjáldan er sterkari enn tann til eina og hvørja tíð ráðandi politiska skipanin og stevnumið hennara. Politikkurin er ætlaður sum politiska semjan, kósin og karmurin um, hvussu vit í felag ætla at flyta okkara samfelag fram á grønu orku- og veðurlagsleiðini. Sum nevnt er ætlanin, at málini, vit seta okkum, og átøkini, ið skulu fremjast, verða samtykt av Løgtinginum.

Tá málini eru sett, kunnu vit heilt ítøkiliga fara undir at fremja átøkini, sum krevjast fyri at røkka málunum. Fleiri av átøkunum, ið ætlandi gerast bulurin í veðurlagspolitikkinum, eru rættiliga ítøkilig og tað er somuleiðis rættiliga greitt, hvørjar lógir og skipanir skulu tillagast fyri at tryggja eina burðardyggari samfelagsmenning. Grøna orkuskiftið verður ein hornasteinur í hesi tilgongdini.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 2. mars 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður